# Føroya Ráfiskakeyparafelag

# Ársfrágreiðing fyri 2010

Ein lýsing av fiskivinnuni og virkseminum hjá felagnum

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

## Samandráttur og frágreiðing frá nevndini

Í 2010 vóru lønargjaldingarnar í fiskavøruídnaðinum góðar 314 mió. kr. í mun til 302 mio kr. og 314 mió. kr í ávikavist 2009 og 2008. Umframt beinleiðis lønargjaldingar hevur avleidda virksemið frá fiskavøruídnaðinum eisini stóran samfelagsbúskaparligan týdning. Avleidda virksemið er t.d. innkeyp, fígging, flutningur, umvælingar, viðlíkahald, og aðrar vørur og tænastur, sum fyritøkur í fiskavøruídnaðinum eftirspyrja.

Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum í 2010 var umleið 4,2, mia. kr., í mun til umleið 3,7 mia. kr. í 2009. Hetta er ein hækking á knappar 500 mió. kr. Eftir at samlaða útflutta nøgdin minkaði frá 2007-2009, kvinkaði útflutta tonsatalið eitt vet uppeftir í 2010. Nøgdin í 2010 var tó framvegis tann næstlægsta eftir aldarskiftið.

Feskfiskaveiðan í 2010 var á knapt 106.000 tons, sum er uml. 5.000 tons minni enn í 2009. Innanhýsis broytingar eru tó millum ymisku fiskasløgini. Eitt nú er nøgdin av toski 3.000 tons størri, og av upsa heili 13.000 tons minni í 2010 enn í 2009.

Í grundgevingunum fyri sínum tilmælum til fiskiskapin undir Føroyum fyri fiskiárið 2009/2010 sigur Havstovan um toskastovnin á landgrunninum, at eftir í fleiri ár á rað at hava havt vánaliga tilgong, eru nú tveir árgangir á veg, og at stovnurin tískil er í vøkstri. Mælt verður til, at hesir árgangir fáa frið at seta til, og at uppvakstrarøkini nær landi og aðrastaðni fáa fríð í mest møguligan mun. Toskurin á Føroyabanka er framvegis søguliga illa fyri, og Havstovan mælir til, at Føroyabanki verður friðaður fyri allari veiðu, og at hetta eisini fer at koma hýsustovninum til góðar. Hýsustovnurin er eisini sera illa fyri, og hevur framvegis alla vernd fyri neyðini. Mett verður, at tilgondin í 2009 var heldur frægari, men at hetta ikki sæst á stovninum fyrr enn um 2-3 ár. Havstovan heldur, at rættast hevði verið at bannað allari beinleiðis veiðu eftir hýsu og at minka um hjáveiðu av hýsu í øðrum fiskiskapum. Upsastovnurin verður mettur at vera hampuliga væl fyri, og gýtingarstovnurin at vera hægri enn minstamarkið hjá ICES. Hinvegin verður mett, at veiðutrýsti eftir upsa er ov høgt.

Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkrum av tí, sum hevur verið á dagskrá hjá felagnum síðani seinasta aðalfund.

Umhvørvismerking, burðardygg veiða – og ikki minst burðardygg umsiting av fiskastovnum - er framvegis á dagsskrá úti í heimi, og í vaksandi mun eisini heima hjá okkum. Fyrstu føroysku fiskiskapirnir hava nú fingið MSC-góðkenning, og fyri okkara felag hevur tað stóran áhuga, hvussu fer at ganga við arbeiðinum hjá felagnum Trolskip við at fáa eina tílíka góðkenning til upsa.

Trýstið frá keyparum, í sambandi við burðardygga veiðu, hevur verið sera sjónligt seinastu árini. Serliga hava vit sæð hetta í sambandi við, at bretskar handilsketur ikki vilja keypa hýsu framleidda í Føroyum. Hesa støðu hava tær tikið, tí teirra ráðgevar siga, at føroyski hýsustovnurin ikki verður umsitin burðardygt. Saman við øðrum hevur Ráfiskakeyparafelagið lagt stórt arbeiði í at upplýsa bretskar innkeyparar og onnur um okkara veiðu og umsiting, og tað hava í hesum sambandi bæði verið fundir í Føroyum og uttanlands. Fundir hava t.d. verið við Youngs og Coldwater, ið eru týðandi kundar hjá føroyskum framleiðarum. Fundur hevur eisini verið við felagsskapin Seafish, ið er sæddur sum ein leiðandi ráðgevandi stovnur fyri fiskivinnuna í Stóra Bretlandi. Hesir fundir hava víst, at tað er sum so einki galið við veiðiskipanini, vit hava, men at tað meira er umsitingin av fiskastovnunum, sum er ein trupulleiki. Kunnandi átøkini, sum vóru í 2009 og 2010 eru stegðaði upp, og tað heldur Ráfiskakeyparafelagið vera óheppið.

Nýggj matvørulóg er samtykt í Løgtinginum í 2010. Í hesum sambandi er ein hópin av lóggávu á veg, sum týdningarmikið er at fylgja við í. í hesum sambandi hevur Vinnuhúsið hevur tikið stig til at seta ein vinnuligan fylgibólk, har umboð fyri føroysk framleiðsluvirkir eru við at fylgja arbeiðinum við kunngerðunum og soleiðis tryggja áhugamálini hjá vinnuni. Ein fundur hevur verið millum vinnuliga fylgibólkin og Heilsufrøðiligu starvsstovnuna, har tosað varð um, hvussu arbeiðið verður lagt til rættis. Væntandi verður nakað væl av virksemi innan hetta øki komandi ár.

Føroya Sporførisskipan, sum Ráfiskakeyparafelagið eigur helvtina av, hevur í fleiri ár arbeitt við at menna eina elektroniska farleið til sporføris- og hagtalsupplýsingar. Skipanir eru nú mentar, og tað er fyri so vítt klárt at brúka skipanina. Treytin er tó, at skipanin verður løgd í eitt rakstrarumhvørvi, men peningur er ikki tøkur til hetta. Harafturat hevur tað víst seg at vera sera trupult at fáa almennu stovnarnar at taka ímóti dátum frá skipanini. Stórt fundarvirksemi hevur verið í 2010 um hetta, men enn er ikki komið á mál. Neyðugt er eisini, at fyritøkur og almennir stovnar, ikki minst Fiskimálaráðið og Fiskiveiðueftirlitið, taka undir við at brúka skipanina og taka hana til sín. Tað er ikki hent enn.

Víst verður annars til samlaðu ársfrágreiðingina, ið er tøk á aðalfundinum og annars verður løgd út á heimasíðuna hjá Vinnuhúsinum.

# Innihald

**INNGANGUR ............................................................ 3**

*Føroya Ráfiskakeyparafelag ............................................................ 3*

**UM FISKI- OG FLAKAVINNUNA ............................................................ 4**

*Lønarútgjaldingar í fiskivinnuni ............................................................ 4*
*Útflutningurin ............................................................ 4*
*Rávørutilgongdin til vinnuna ............................................................ 6*
*Miðal avreiðingarprísir ............................................................ 7*
*Útflutningur av heilum køldum fiski ............................................................ 78*
*Avreiðingar uttanlands ............................................................ 8*
*Flakavinnan ............................................................ 9*
*Veiðuliðið ............................................................ 10*
*Útlitini fyri fiskiskapin undir Føroyum ............................................................ 10*

**VIRKSEMI FELAGSINS Í FARNA ÁRI ............................................................ 12**

*Arbeiðsmarknaðarspurningurin ............................................................ 12*
*Elektrónisk sporførisskipan ............................................................ 12*
*Ólógligur, ófráboðaður og óskipaður fiskiskapur (IUU fishing) ............................................................ 13*
*Umhvørvismerking ............................................................ 14*
*Trupulleikar av, at fiskastovnar ikki eru nóg burðardygt umsitnir ............................................................ 14*
*Nýggj matvørulóg ............................................................ 15*
*Broytingar í kunngerð um avreiðingar í Føroyum og uttanlands ............................................................ 16*
*Fiskivinnuting ............................................................ Fejl! Bogmærke er ikke defineret.16*
*Skjal 1: Fiskavøruútflutningur í 2009 og 2010 ............................................................ 17*

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing er løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag tann 5. apríl 2011. Ráfiskakeyparafelagið er eitt áhugafelag hjá ráfiskakeyparum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Endamálið við frágreiðingini er at geva limum okkara og øðrum áhugaðum eina stutta lýsing av gongdini í fiski- og flakavinnuni og virksemi felagsins.

## Føroya Ráfiskakeyparafelag

Í nevndini fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

Simon P. Jacobsen, formaður

Regin Mikkelsen, næstformaður

Petur Mohr

Joen Magnus Rasmussen

Jógvan Gregersen

Limirnir í Føroya Ráfiskakeyparafelag eru pr. 1. Apríl 2011:

| | |
|---|---|
| FarIta P/F | Sandoy Seafood P/F |
| Delta Seafood | Nevið P/F |
| J.M.A. v/Jógvan Absalonsen | Thomson P/F |
| Hvilvtenni P/F | Kósin P/F |
| Tavan Sp/f | Suðuroyar Fiskakeyp |
| Vaðhorn Seafood P/F | Rainbow Seafood Sp/f |
| Fiskavirkið P/F | FoFish Sp/f |

# Um fiski- og flakavinnuna

## Lønarútgjaldingar í fiskivinnuni

Um hugt verður eftir lønarútgjaldingum í fiskiskapi og fiskaframleiðslu frá 2005 til 2010 sæst, at frá 2005 til 2007 vóru lønarútgjaldingarnar frá flakavinnuni umleið 350 mió. kr. Seinastu trý árini eru lønarútgjaldingarnar minkaðar 40-50 mió. kr., har 2009 var vánaligasta árið, men í 2010 kvinkar uppeftir aftur. Fyri veiðuliðið sæst, at lønarútgjaldingarnar í 2006 og 2007 táttaðu í milliardina, men fullu niður á knappar 600 mió. kr. í 2009. Í 2010 hava lønarútgjaldingarnar tó kvinkað nakað uppeftir, soleiðis at tær eru góðar 700 mió. kr.

| | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskiskapur | 835.154 | 937.606 | 951.947 | 724.205 | 576.131 | 714.161 |
| Fiskavøruídnaður | 355.395 | 362.330 | 349.730 | 314.920 | 302.561 | 314.777 |
| Tilsamans | 1.190.549 | 1.299.935 | 1.301.677 | 1.039.125 | 878.692 | 1.028.939 |

## Útflutningurin

Samlaði føroyski útflutningurin av fiskavørum í nøgd og virði er vístur í mynd 1. Í nøgd er útflutningurin í 2010 gjørdur upp til 303.000 tons, sum er eitt vet hægri enn í 2009. Hetta er tó nakað væl minni, um samanborið verður við sera góðu árini frá 2003 til 2007. Sjálvt um nøgdin av útfluttum laksi í 2010 er nakað væl minni enn undanfarna ár, er útflutningsvirðið fyri samlaða útflutningin hækkað í 2010 í mun til 2009.




*Mynd 1. Útflutningur av fiskavørum: Nøgd og virði frá 2000 til 2010. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Í skjali 1, sum sæst aftast í hesari frágreiðing, er eitt útgreinað yvirlit yvir útflutningsnøgd og –virði fyri flestu fiskasløg.

Samlaða útflutningsnøgdin av frystum og køldum flaki, úr toski, hýsu og upsa, var umleið 3.500 tons minni í 2010 samanborið við 2009. Hinvegin var útflutningsvirðið av hesum vørum eitt vet hægri í 2010 enn í 2009. Størsta orsøkin til hækkaða virðið er, at prísurin á toskafløkum í miðal var góðar 6 kr. hægri per kilo í 2010 enn í 2009. Miðal hýsu- og upsaprísurin er somuleiðis hægri í 2010 enn í 2009.

Samlaði miðalprísurin fyri hesi fiskasløg er sostatt góðar 4 kr. hægri í 2010 í mun til 2009.

| | Nøgd í tonsum | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur/kg. | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2009 | 2010 | 2009 | 2010 | 2009 | 2010 |
| **Flak, fryst og kølt** | | | | | | |
| Toskur | 6.222 | 6.916 | 171.076 | 233.682 | 27,49 | 33,79 |
| Hýsa | 1.821 | 1.238 | 38.566 | 30.351 | 21,18 | 24,52 |
| Upsi | 22.334 | 19.039 | 473.085 | 454.734 | 21,18 | 23,88 |
| Onnur fiskasløg | 2.310 | 972 | 41.800 | 28.971 | 18,10 | 29,80 |
| **Tilsamans** | **32.687** | **28.165** | **724.527** | **747.737** | **22,17** | **26,55** |
| **Saltfiskur, flaktur og flak** | | | | | | |
| Toskur | 4.347 | 5.416 | 191.987 | 221.802 | 44,16 | 40,95 |
| Hýsa | 0 | 0 | 0 | 0 | | |
| Upsi | 2.892 | 2.850 | 38.374 | 48.727 | 13,27 | 17,10 |
| Onnur fiskasløg | 3.984 | 5.111 | 100.191 | 143.106 | 25,15 | 28,00 |
| **Tilsamans** | **11.223** | **13.377** | **330.552** | **413.635** | **29,45** | **30,92** |
| **Heilur fiskur, frystur og køldur** | | | | | | |
| Toskur | 2.225 | 3.884 | 35.899 | 67.567 | 16,14 | 17,40 |
| Hýsa | 3.756 | 4.008 | 51.419 | 65.193 | 13,69 | 16,27 |
| Upsi | 3.158 | 1.441 | 27.019 | 16.799 | 8,56 | 11,66 |
| Onnur fiskasløg | 17.258 | 25.619 | 230.173 | 338.320 | 13,34 | 13,21 |
| **Tilsamans** | **26.397** | **34.951** | **344.511** | **487.879** | **13,05** | **13,96** |

*Mynd 2. Útflutningur í nøgd og virði, býtt á vørubólkar av toski, hýsu og upsa 2009 og 2010 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Nøgdirnar av útfluttum saltfiski vóru á leið 2.000 tons størri í 2010 í mun í 2009. Ein broyting millum fiskasløgini er tó hend, við tað, at nøgdin av saltaðum toski er økt við umleið 1.000 tonsum, nøgdin av upsa stendur í stað, meðan nøgdin av øðrum fiskasløgum til saltingar eisini er økt við umleið 1.000 tonsum.

Samlaða útflutningsvirðið av saltfiski er somuleiðis hækkað nakað í 2010 í mun til 2009. Hetta kemst einamest av øktu nøgdini av saltfiski til útflutnings, tí miðalprísurin er bert

kvinkaður góða krónu uppeftir. Vert er at leggja til merkis, at miðalprísurin á salttoski er minkaður góðar 3 kr. kg. í tíðarskeiðnum.

Útfluttu nøgdirnar av frystum og feskum óvirkaðum fiski, øktust við á leið 8.000 tonsum í 2010. Virðið er hækkað lutfalsliga meira, orsaka av at miðalprísurin á hesum fiskasløgunum er hækkaður knappa krónu fyri kg.

## Rávørutilgongdin til vinnuna

Um hugt verður eftir fiskiskapinum seinastu tvey árini, kann staðfestast, at feskfiskaveiðan í 2010 var góð 5.000 tons minni enn í 2009, har hon var á leið 111.000 tons. Innanhýsis broytingar eru millum fiskasløgini, við tað, at nøgdin av upsa er umleið 13.000 tons minni. Toskafiskiskapurin og fiskiskapurin eftir øðrum botnfiski hevur tó verið nakað betri í 2010 enn í 2009.

Avreiðingarvirðið á feskum fiski var góðar 900 mió. kr. í 2010 ímóti góðum 770 mió. kr. í 2009. Hyggja vit longur aftur, kunnu vit síggja, at avreiðingarvirðið í 2007 var 1,16 mia. kr. og í 2006 1,25 mia. kr. Hetta merkir, at avreiðingarvirðið á feskum fiski var 300 mió. kr. lægri í 2010 enn í 2006.

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. Kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2009** | **2010** | **2009** | **2010** | **2009** | **2010** |
| **Toskur** | 10.824 | 13.807 | 138.553 | 193.088 | 12,80 | 13,98 |
| **Hýsa** | 5.216 | 4.907 | 47.868 | 55.490 | 9,18 | 11,31 |
| **Upsi** | 53.175 | 40.205 | 295.704 | 294.254 | 5,56 | 7,32 |
| **Annar botnfiskur** | 11.544 | 15.367 | 85.157 | 140.665 | 7,38 | 9,15 |
| **Flatfiskur tils.** | 4.925 | 4.459 | 105.889 | 110.925 | 21,50 | 24,88 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 25.761 | 27.242 | 98.681 | 108.927 | 3,83 | 4,00 |
| **Veiðan tilsamans** | 111.444 | 105.987 | 771.853 | 903.349 | | |

*Mynd 3. Feskfiskaveiða: Nøgd, virði og miðalprísur í 2008 og 2010 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Mynd 3 vísir, at avreiðingarprísurin pr. kg. er væl hægri í 2010 enn í 2009 á øllum feskfiskasløgunum. Serliga sjónligt er tað við upsa- og hýsuprísinum, sum er hækkaður á leið 2 kr. kg. Somuleiðis er avreiðingarprísurin á flatfiski hækkaður við meira enn 3 kr. kg.

Í 2010 tók toskafiskiskapurin seg eitt sindur uppaftur. Hetta er fyrstu ferð seinastu átta árini, har tað tey sjey undanfarnu hevur verið minking í toskafiskiskapinum. Í 2002 vóru avreidd góð 38.000 tons, meðan tað í 2010 bert vóru avreidd sløk 14.000 tons, eftir at hava botnað á knøppum 11.000 tonsum í 2009.

Fiskiskapurin eftir hýsu er nú minkaður í sjey ár á rað. Veiðunøgdin í 2003 var umleið 24.600 tons, meðan hon í 2009 bert var knøpp 5.000 tons, ella umleið ein fimting av nøgdini fyri seks árum síðani.

Upsafiskiskapurin, sum hevur verið javnt góður í nógv ár, er í 2010 minkaður við umleið 13.000 tonsum.

## Miðal avreiðingarprísir

Mynd 4 vísir gongdina í miðal avreiðingarprísunum á toski, hýsu og upsa frá 2001 til 2010. Myndin vísir greitt, at gongdin við hækkandi prísum á toski og hýsu fekk ein bráðan enda í 2007. Miðalprísurin fyri øll fiskasløgini tekur seg tó nakað uppeftir í 2010. Miðal avreiðingarprísurin fyri tosk var í 2009 tann lægsti í hesari øldini, meðan tað fyri hýsu bert hava verið lægri prísir í 2003 og 2004. Hinvegin vísir myndin eisini, at prísurin á upsa liggur rímiliga javnt um 5 kr. kg. fram til 2009. Í 2010 er upsaprísurin hægri, enn hann fyrr hevur verið í hesari øldini.




*Mynd 4. Miðalprísir á toski, hýsu og upsa frá 2001-2010 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Til og við 2007 vigaðu príshækkingarnar væl upp ímóti minkandi nøgdunum av serliga toski og hýsu. Men seinastu árini hava avbjóðingarnar hjá vinnuni verið serliga stórar, tí nøgdirnar av fiski eru minkaðar, samstundis sum miðalprisurin er lækkaður. Í 2010 vóru tó positiv tekin at hóma, og tað er at vóna at staðfesti prísvøksturin kann halda fram.

## Útflutningur av heilum køldum fiski

Síðani ógvusligu hækkingina í tíðarskeiðnum frá 2000 til 2003 hevur útflutningurin av heilum køldum fiski verið javnt minkandi. Eitt undantak var tó útflutningurin av upsa,

sum hækkaði nakað í 2005. Eisini hevur útflutningurin á toski kvinkað uppeftir aftur seinastu 2 árini.




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 3.470 | 4.486 | 10.18 | 8.396 | 6.182 | 4.371 | 3.676 | 1.884 | 1.725 | 2.192 | 3.283 |
| Hýsa | 4.244 | 6.445 | 13.18 | 14.42 | 12.10 | 10.57 | 9.506 | 7.052 | 4.366 | 3.748 | 3.916 |
| Upsi | 1.814 | 5.210 | 11.26 | 13.20 | 9.374 | 11.87 | 4.214 | 3.932 | 1.574 | 3.158 | 1.441 |

*Mynd 5. Útflutningur av heilum køldum fisk frá 2000-2010 (Kelda:Hagstova Føroya).*

Samlaða nøgdin av toski, hýsu og upsa, sum fór óvirkað av landinum í 2010, var sløk 9.000 tons. Hetta er nakað minni enn í 2009.

## Avreiðingar uttanlands

Mynd 6 vísir gongdina í avreiðingum uttanlands. Tað sæst, at eftir at hava verið rímuliga støðugar frá 2006 til 2008 hækkaðu nøgdirnar nakað í 2009, fyri síðani at fella aftur í 2010.




*Mynd 6. Landingar uttanlands 2000-2010 (Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

Samlaða nøgdin avreidd uttanlands í 2010 var góð 7.600 tons í mun til 11.000 tons í 2009, harav annar fiskur, enn toskur, hýsa og upsi, taldi 4.500 tons. Í mun til árini frá 2002 til 2005, tá rættuliga nógvur fiskur varð landaður uttanlands, kemur tað nú nærum ikki fyri, at toskur og hýsa verða avreidd uttanlands. Eisini nøgdirnar av uppsa eru minkaðar munandi og eru knøpp 700 tons í 2010 í mun til umleið 2.500 tons í 2009.

## Flakavinnan

Samlað sæð hava seinastu nógvu árini verið avbjóðandi hjá føroysku flakavinnuni. Fallandi rávørunøgdir og óstøðuðu marknaðarviðurskifti orsaka av fíggjarkreppuni hava verið høvuðsatvoldin til stóru avbjóðingarnar.

Seinnu árini hava vit sæð, at virki eru steðgaði, men tað vísir seg tó ofta, at virkini opna aftur við nýggjum eigarum. Stórsta hóttafallið í 2010 hendi, tá Faroe Seafood endaði í Fútarættinum seint í árinum. Hetta merkist sjálvsagt í samfelagnum við m.a. høgum arbeiðsloysi. Ein avkláring er nú komin uppá støðuna hjá hesum virkjum og skipum og áhugavert verður at síggja komandi tíðina, hvussu vinnan fótar sær aftur.

Miðalstóru virkini hava tó klárað seg hampuliga væl og einstøk virki sera væl. Eyðkennið við flestu av hesum virkjunum er sera lítil skuld og góð tillagingarevnir í mun til viknandi rávørugrundarlag.

Stóra avbjóðingin seinnu árini við at fáa arbeiðsmegi til virkini er ikki til longur, og er hetta til frama fyri vinnugreinina sum heild. Høga arbeiðsloysið, sum er í løtuni, fer vónandi ikki at halda sær, og tá arbeiðsloysið lækkar aftur er sera sannlíkt, at flakavirkini aftur fáa trupulleikar við at fáa nokk av arbeiðsmegi. Hetta er ein sera

óheppin ringrás, og eingin ivi er um, at loysn eigur at fáast á hesum trupulleika sum skjótast. Føroysk virkir eiga at fáa møguleikan frítt at seta eisini útlendsk starvsfólk, tá tað er neyðugt.

## Veiðuliðið

Sum tað eisini er greitt frá frammanfyri, var samlaða feskfiskaveiðan í 2010 umleið 105.000 tons, sum er tað lægsta í tíðarskeiðnum frá 2004-2010. Verður hugt eftir einstøku skipabólkunum sæst, at serliga lemmatrolarar og partrolarar hava fiskað munandi minni í 2010 enn í 2009. Línuflotin hevur havt væl betri fiskiskap í 2010 enn í 2009, meðan snellu- og garnafiskiskapurin er nakað tann sami bæði árini.

| | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lemmatrol** | 30.609 | 30.878 | 32.405 | 32.503 | 21.840 | 20.235 | 17.484 |
| **Partrol** | 44.962 | 62.811 | 61.912 | 57.238 | 63.344 | 65.179 | 57.709 |
| **Lína** | 40.230 | 34.972 | 32.573 | 26.257 | 21.787 | 19.658 | 23.688 |
| **Snella** | 2.963 | 2.824 | 3.232 | 2.028 | 1.853 | 3.776 | 3.857 |
| **Gørn og annað** | 3.305 | 3.264 | 3.182 | 3.019 | 2.986 | 2.596 | 2.769 |
| **Reiðskapur tils** | 122.069 | 134.748 | 133.303 | 121.045 | 111.809 | 111.444 | 105.506 |

*Mynd 8. Fiskiskapurin hjá heimaflotanum frá 2004-2010 í tonsum (Kelda: Hagstova Føroya)*

Føroyski heimaflotin hevur havt sera stórar avbjóðingar seinastu árini. Fallandi fiskiskapur og lágir prísir hava merkt vinnuna. Úrslitini hjá flotanum fyri 2010 eru ikki tøk enn, men lítið bendir á, at hesi vera góð.

## Útlitini fyri fiskiskapin undir Føroyum

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum í fiskiárinum 2010/2011 segði Havstovan um toskastovnin á landgrunninum, at eftir í fleiri ár á rað at hava havt vánaliga tilgongd, eru nú tveir árgangir á veg, og at stovnurin tískil er í vøkstri. Mælt verður til, at hesir árgangir fáa frið at seta til, og at uppvakstrarøkini nær landi og aðrastaðni fáa fríð í mest møguligan mun.

Toskurin á Føroyabanka er framvegis søguliga illa fyri og Havstovan mælir til at Føroyabanki verður friðaður fyri allari veiðu, og at hetta eisini fer at koma hýsustovninum til góðar.

Hýsustovnunrin er eisini sera illa fyri og hevur framvegis alla vernd fyri neyðini. Mett verður at tilgondin í 2009 var heldur frægari, men at hetta ikki sæst á stovninum fyrr enn um 2-3 ár. Havstovan heldur, at rættast hevði verið at bannað allari beinleiðis veiðu eftir hýsu og at minka um hjáveiðu av hýsu í øðrum fiskiskapum.

Upsastovnurin verður mettur at vera hampuliga væl fyri og gýtingarstovnurin at vera hægri enn minstamarkið hjá ICES. Hinvegin verður mett, at veiðutrýstið eftir upsa er ov høgt.

Yvirskipað mælir Havstovan til, at fiskidagaskipanin verður stillað rætt við at minka líðandi um dagatalið, tí at hetta hevði havt gagnliga ávirkan á allar tríggjar stovnarnar.

Samanfatandi mælir Havstovan til, at skerja dagatalið og at brúka aðrar reguleringar fyri at geva smáfiski betri møguleikar at vaksa seg inn í fiskiskapin (toskur, hýsa, upsi).

Somuleiðis hevði verið best fyri fiskastovnarnar – bæði lívfrøðiliga og búskaparliga-, at fiskidagatalið varð skert við 50%, men mælt verður til, at hetta verður gjørt so líðandi.

Samanumtikið mugu vit helst ásanna, at útlitini fyri fiskiskapinum eftir toski og hýsu ikki eru nakað serlig, og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðunøgdin av toski og hýsu verður nakað tann sama í 2011 sum í 2010. Hinvegin geva veiðuhagtølini ábendingar um, at fiskiskapurin eftir toski var heldur frægari í 2010 enn í 2009. Somuleiðis hava útlitini verið líka ring onkuntíð fyrr, og at tað tá kortini hevur bragdað aftur. T.d. sigur Havstovan í viðmerkingunum til sítt seinasta tilmæli m.a., at tað er hugsandi, at toskastovnurin kemur fyri seg um nøkur fá ár, men at økingin er treytað av, at veiðitrýstið komandi fiskiárini verður hildið niðri. Havstovan sigur tó samstundis, at teirra útrokningar vísa, at verandi veiðitrýst er so høgt, at toskastovnurin sum frá líður fer at geva minni og minni av sær. Glottar eru viðvíkjandini hýsustovninum, men framhaldandi verður rátt til at verja ungfiskin og at minka munandi um fiskiskapin.

Upsastovnurin verður sagdur at vera hampuliga væl fyri, men fiskiskapurin eftir upsa í 2010 og higartil í 2011 hevur verið munandi verri enn undanfarin ár. Útlitini fyri nøgdunum av upsa eru tískil sera ring at meta um.

Onnur fiskasløg sum t.d. brosma og longa tykjast at vera rættuliga støðug, og sambært seinastu kanningunum hjá Magnusi Heinasyni tykjast hesir stovnar framvegis at vera væl fyri. Hóast veiðan eftir gullaksi er nógv økt seinnu árini, tykist hesin stovnurin sambært Havstovan framvegis eisini at vera væl fyri.

# Virksemi felagsins í farna ári

Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkrum málum, sum hetta seinasta árið hava myndað virksemið hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Seinast Føroya Ráfiskakeyparafelag hevði aðalfund var 23. apríl 2010. Nevndarlimirnir, ið stóðu fyri vali tá, vóru Simon P. Jacobsen, Páll Gregersen og Petur H. Mohr. Simon P. Jacobsen og Petur H. Mohr vóru afturvaldir og Jógvan Gregersen kom í nevndina fyri Páll Gregersen, sum ikki stillaði uppaftur. Seinni skipaði nevndin seg við Simon P. Jacobsen sum formanni og Regin Mikkelsen sum næstformanni.

## Arbeiðsmarknaðarspurningurin

Í nógv ár hevur tað verið eitt afturvendandi evni, at flestu fiskavirkir mangla arbeiðsmegi. Arbeiðsloysið í Føroyum var í fleiri ár sera lágt, og lógarforðingar gjørdu at sera torført var at fáa útlendska arbeiðsmegi at arbeiða á virkjunum. Hetta hevði serliga neiliga ávirkan á fiskavirkini, tí hesin parturin av arbeiðsstyrkini er sera flytførur.

Tað eydnaðist á summrið 2009 langt um leingi at minka um lógarforðingarnar og fáa eina skipan, sum gjørdi tað léttari at fáa útlendska arbeiðsmegi til virkini. Henda skipan var tó bert í gildi, so leingi arbeiðsloysið var minni enn 3,5%, og er tí ikki virkin í løtuni, nú arbeiðsloysið er hægri enn tað. Hækkaða arbeiðsloysið hevur havt við sær, at betri møguleikar nú eru at fáa fólk at arbeiða á fiskavirkjunum, og tí er manglandi arbeiðsmegi í løtuni ikki ein trupulleiki.

Tað er umráðandi fyri framtíðina hjá føroysku flakavinnuni, at møguleikin at fáa starvsfólk eisini uttanlands frá er til staðar. Fyrr ella seinni fer arbeiðsloysið at fella aftur, og tá fer flakavinnan at hava somu trupulleikar við at útvega arbeiðsmegi sum undanfarin ár. Tískil metir Ráfiskakeyparafelagið, at tað er sera umráðandi fyri fískavirkini, at Føroyar í minsta lagi hava atgongd til ES arbeiðsmegi, og at kravið um minimum 3,5% arbeiðsloysi fyri at fáa útlendska arbeiðsmegi til landið verður avtikið.

## Elektrónisk sporførisskipan

Føroya Ráfiskakeyparafelag eigur partapening í Føroya Sporførisskipan, sum felagið eigur saman við Føroya Ráfiskaseljarafelag.

Føroya Sporførisskipan hevur í fleiri ár arbeitt við at menna eina elektroniska farleið til sporføris- og hagtalsupplýsingar frá vinnuni til almennar stovnar og millum ymisku liðini í virðisketuni frá fiskiskapi til keyparan á altjóða marknaðinum. Skipanin skal fevna um

øll lið í virðisketuni - skip, landingarmiðstøðir, fiskamarknaðir, flutningsfeløg, framleiðsluvirkir, fiskasølur og útflutningsfeløg.

Tað hevur tó tíverri víst seg at ganga ógvuliga striltið við at fáa skipanina tikna í nýtslu. Royndarkoyringar eru tó gjørdar av ymiskum modulum í skipanini, og hevur hetta sæð lovandi út. Eftir fundarvirksemi í hesum árinum, m.a. við TAKS, Fiskiveiðieftirlitið, flutningsfeløgini, FISK og forritarafyritøkurnar Formula.fo og Atlantstøkni er niðurstøðan, at sera torført er at fáa almennu myndugleikarnar, serliga Fiskiveiðieftirlitið og FISK, at draga hesa línu saman við vinnuni. Sigast kann, at man ikki er komin nærri nakrari loysn. Týdningarmiklastu samstarvsfelagar í hesum høpi eru Fiskimálaráðið og Fiskiveiðieftirlitið, men tað sýnist ikki, sum vilji er til at finna loysnir yvirhøvur.

Tað stutta av tí langa er, at framtíðin hjá Føroya Sporførisskipan er ógvuliga óviss, og mest sannlíkt er, at felagið verður avtikið. Ráfiskaseljarafelagið hevur tó víst felagnum størri áhuga enn Ráfiskakeyparafelagið, og tað kann kanska hugsast, at tað felagið vil yvirtaka Føroya Sporførisskipan.

## Ólógligur, ófráboðaður og óskipaður fiskiskapur (IUU fishing)

Í síðstu ársfrágreiðing var greitt frá einari nýggjari fyriskipan um ólógligan, ófráboðaðan, og óskipaðan fiskiskap, sum ES-ráðið hevði samtykt í september 2008 (á enskum Illegal, Unreported and Unregulated Fishing – stytt IUU-fising). Henda fyriskipan byrjaði at virka 1. januar 2010, og verður í Føroyum umsitin av Fiskiveiðieftirlitinum.

Sambært grundgevingunum fyri fyriskipanini er endamálið at forða fyri teimum oyðileggjandi skaðum á fiskastovnar v.m., sum standast av IUU fiskiskapi. ES marknaðurin er størsti innflytari av fiskavørum í heiminum, og metir ES seg tískil hava skyldu til, at hava eina lyklastøðu í stríðnum móti IUU fiskiskapi.

Fyriskipanin er galdandi fyri øll fiskifør uttan mun til, hvørjum flaggi tey sigla undir, og hvar tey fiska.

Høvuðsamboðið til tess at náa endamálinum er ein eftirlitsskipan, ið nágreiniliga kann staðfesta, hvar fiskurin er veiddur. Allur fiskur, virkaður ella óvirkaður, skal hava eitt Catch Certification Scheme (eftir hetta nevnt CCS-skjal) sum eina váttan uppá, at veiðan er farin fram eftir reglunum í fyriskipanini.

Sambært fyriskipanini skal allur fongur, um hann er veiddur í ES sjóøki, ella sjóøki hjá einum triðja landi, hava CCS-skjalið, áðrenn hann kann verða fluttur inn á ES marknaðin. CCS-skjalið skal vera vátta av einum almennum myndugleika í tí landi, har fiskifarið er skrásett. Hetta er eisini galdandi, um vøra verður flutt frá triðja landi til triðja land og síðani inn á ES marknaðin. Um CCS-skjalið ikki er útfylt sambært fyriskipanini, verður noktað farinum at landa vøruna í ES havnum.

Tað er Fiskimálaráðið, ið hevur staðið fyri at fyrireika føroysku umsitingina av hesum CCS-skjali, og var Ráfiskakeyparafelagið í hesum sambandi umboðað á fleiri fundum í Fiskimálaráðnum. Sum nevnt, er tað tó Fiskiveiðieftirlitið, ið umsitur hetta øki og hevur ábyrgdina av at góðkenna veiðiváttanirnar ella CCS-skjølini. Skipanin hevur nú verið í gildi í góðar 3 mánaðir, og sum skilst á flestu útflytarum, hava ikki staðist nógvir stórir trupulleikar av hesum.

## Umhvørvismerking

Spurningurin um umhvørvismerking gerst alsamt meira átrokandi, men í Føroyum er eingin felags linja á hesum øki. Sum í so mongum øðrum vinnuligum viðurskiftum, hevur verið ósemja, um vit eiga at ganga hesa leiðina ella ikki. Tí hendi leingi ikki tað stóra við hesum spurningi, men síðsta árið ella so er tó broyting komin í.

Felagið Nótaskip hevur fingið MSC-góðkenning av sildaveiðuni. Arbeitt hevur eisini við at fáa slíka góðkenning av markelfiskiskaåinum, men hetta hevur tó ikki borðið á mál orsaka av ósemjuni millum strandalondini um býtið av makrelinum.

O.C. Joensen á Oyri hevur biðið um MSC-góðkenning til skeljaveiðu og hevur fingið hesa við ávísum treytum.

Somuleiðis arbeiðir Felagið Trolskip við at fáa fiskiskapin eftir upsa MSC-góðkendan, men hetta arbeiði er ikki komið á mál enn. Líkt er tí til, at trýstið frá keyparum, ið spyrja eftir umhvørvismerktum (t.e. burðardygt veiddum og umsitnum) fiski, er vorðið so stórt, at mótstøðan, ið hevur verið ímóti tílíkari merking, er við at tagna. Tí kunnu vit helst rokna við, at komandi árini fer vinnan at leggja seg eftir at fáa veiðuna eftir fleiri fiskasløgum góðkenda sum burðardygga.

## Trupulleikar av, at fiskastovnar ikki eru nóg burðardygt umsitnir

Trýstið frá keyparum í sambandi við burðardygga veiðu hevur verið sera sjónligt seinastu tíðina. Serliga hava vit sæð hetta í sambandi við, at bretskar handilsketur ikki vilja keypa hýsu framleidda í Føroyum. Hesa støðu hava tær tikið, tí teirra ráðgevar siga, at føroyski hýsustovnurin ikki verður umsitin burðardygt. Ráðgevingin byggir m.a. á, at føroyska hýsan er á einum lista hjá Marine Conservation Society (MCS) yvir "Fish to avoid". At MCS setur føroysku hýsuna á henda lista, kemst m.a. av tilráðingunum hjá ICES, sum mæla frá at fiska hýsu, tí stovnurin er so lítil, at hann sjálvt undir góðum umstøðum er í vanda fyri ikki koma fyri seg aftur. Eisini heimasíðan FishSource.org gevur umsitingini av føroysku fiskastovnunum sera vánaligt skoðsmál (karakter 0,0).

Fyri kortum var hýsan flutt á listanum á MCS, og metir felagsskapurin nú at hýsustovnurin við Føroyar er heldur frægari fyri.

Saman við øðrum hevur Ráfiskakeyparafelagið lagt stórt arbeiði í at upplýsa bretskar innkeyparar og onnur um okkara veiðu og umsiting, og tað hava í hesum sambandi bæði verið fundir í Føroyum og uttanlands. Fundir hava t.d. verið við Youngs og Coldwater, ið eru týðandi kundar hjá føroyskum framleiðarum. Fundur hevur eisini verið við felagsskapin Seafish, ið er sæddur sum ein leiðandi ráðgevandi stovnur fyri fiskivinnuna í Stóra Bretlandi, hóast stovnurin ikki beinleiðis hevur nakað vald. Seafish sendur javnan kunningar- og ráðgevandi skriv út, sum serliga verður brúkt av innkeyparunum hjá teimum stóru feløgunum. Viðmælini hjá Seafish eru ikki altíð tey somu sum tey hjá øðrum felagsskapum, sum t.d. MSC og ICES, og Seafish hevur tað fatan, at føroyska fiskaveiðan er eins burðardygg sum hjá øðrum. Kanska enntá meir burðardygg enn hjá øðrum, av tí at einki verður kastað útaftur.

Tað vísir seg heldur ikki at vera so nógv sjálv fiskiveiðan, sum er ein trupulleiki, men meira umsitingin av fiskastovnunum. Tí er eftir øllum at døma eisini neyðugt, at nakrar umsitingarligar/politiskar avgerðir verða tiknar, áðrenn føroyskar fiskavørur aftur fáa betri atgongd til bretskar kølidiskar. Í tíðindaskrivi, sum Seafish sendi út aftaná, at tey høvdu havt fund við umboð fyri føroyska fiskivinnu, varð hetta orðað soleiðis: *"There are issues that need to be addressed if the supply chain is to be re-established, particularly concerns over the discrepancy between government and scientific advice on numbers of fishing days."* Trupulleikin, ið her verður sipað til, er, at Løgtingið ásetur nógv fleiri fiskidagar, enn ráðgevingin frá Havstovuni mælir til. Í summum førum, serliga í bólki 5, eru nøgdin av tillutaðum døgum eisini so stór, at hon langt frá verður brúkt, og tí er í veruleikanum talan um óavmarkað dagatal!

Føroya Ráfiskakeyparafelag heldur, at málrættaðu átøkini at kunna um føroyskan fiskiskap, og í hesum føri serliga hýsuna, manglar. Eftir stórt virksemi í 2009 og fyrst í 2010 er einki gjørt við hetta mál.

## Nýggj matvørulóg

Nýggj matvørulóg er komin í gildið i 2010. Sum ein avleiðing av nýggju matvørulógini skal hópin av kunngerðum gerast av nýggjum umframt dagføringar av verandi kunngerðum.

Vinnuhúsið hevur saman við Ráfiskakeyparafelagnum tikið stig til at seta ein vinnuligan fylgibólk, har umboð fyri føroysk framleiðsluvirkir fylgja arbeiðnum við kunngerðunum og soleiðis tryggja áhugamálini hjá vinnuni. Ein fundur hevur verið millum vinnuliga

fylgibólkin og Heilsufrøðiligu Starvsstovnuna, har tosað varð um, hvussu arbeiðið verður lagt til rættis.

## Broytingar í kunngerð um avreiðingar í Føroyum og uttanlands

Fiskimálaráðið hevur broytt kunngerðina fyri avreiðing í Føroyum og uttanlands. Tað, sum er mest viðkomandi fyri okkara limir, er, at ætlanin var at avtaka uppboðssølukravið til hýsu í eini royndartíð fram til 1. September 2010. Henda royndartíð er nú longd.

## Skjal 1: Fiskavøruútflutningur í 2009 og 2010

Útflutningsvirði er gjørt upp í FOB=Free On Board
Kelda: Hagstova Føroya, dagført 16. mars 2011

| | Virði í 1.000 DKK | | | Nøgd í tonsum | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2009** | **2010** | **Munur** | **2009** | **2010** | **Munur** |
| Állur | | 4 | 0 | - | 0 | |
| Annar fiskur, i.a.n. | 194.793 | 205.434 | -58.205 | 16.893 | 18.765 | -17.235 |
| Annar flundrufiskur, i.a.n. | 32 | 375 | -149 | 7 | 11 | -15 |
| Annar ídnaðarfiskur, i.a.n. | 5.913 | 15.606 | -700 | 1.123 | 4.408 | 141 |
| Blálonga | 12.256 | 20.547 | 1.362 | 945 | 1.630 | 136 |
| **Brosma** | **38.408** | 56.043 | **-873** | 1.920 | 2.285 | 315 |
| Búrfiskur | 0 | 1.332 | -1.525 | - | 60 | |
| Glashvoysa | 0 | 988 | -4 | - | 15 | |
| **Gullaksur** | **74.747** | 134.259 | **-5.340** | 5.992 | 14.776 | -1.151 |
| Havtaska | 56.866 | 71.677 | -3.164 | 1.144 | 1.537 | -177 |
| Hávur | 1.774 | 2.351 | 374 | 146 | 158 | 27 |
| Hummari | 5.525 | 7.195 | -2.780 | 51 | 56 | -3 |
| Hvítingsbróður | 0 | - | 0 | - | - | |
| Hvítingur | 7.377 | 10.402 | -2.804 | 423 | 566 | -275 |
| **Hýsa** | **99.317** | 101.948 | **-73.106** | 5.902 | 5.569 | -1.721 |
| Høgguslokkur | 62 | 8 | -138 | 6 | 1 | -57 |
| Jákupsskel | 14.285 | 21.158 | 4.502 | 440 | 888 | 201 |
| Kalvi | 8.063 | 8.334 | -959 | 181 | 158 | -16 |
| Kikarafiskur | | 299 | -451 | - | 28 | |
| Kongafiskur | 44.851 | 73.864 | -7.442 | 3.184 | 4.430 | -513 |
| Krabbi | 3.555 | 6.383 | -8.734 | 127 | 165 | -39 |
| Kræklingur | 0 | - | 0 | - | - | |
| Laksur | 1.202.727 | 1.338.081 | 378.308 | 40.563 | 33.695 | 8.809 |
| Langasporl | 3.523 | 2.451 | -2.709 | 353 | 238 | -286 |
| Livur | 3.849 | 2.580 | -2.979 | 135 | 323 | -141 |
| Lodna | 0 | 11.069 | -11.688 | - | 3.531 | |
| **Longa** | **76.322** | 100.681 | **-10.000** | 3.276 | 3.581 | 331 |
| Lýsi | 3.618 | 12.525 | 3.239 | 67 | 2.091 | 12 |
| Lýsingur | 7.537 | 6.808 | 6.609 | 4.709 | 2.843 | 4.418 |
| Makrelur | 185.115 | 280.926 | 10.366 | 32.739 | 42.023 | 4.366 |
| Nebbasild | 127 | 4.109 | -249 | 9 | 2.585 | -50 |
| Onnur skeljadjór o.l. i.a.n. | 498 | 1.240 | -260 | 1.632 | 3.390 | -754 |
| Reyðsprøka | 16.541 | 13.261 | -2.666 | 697 | 470 | 94 |
| Rogn | 8.422 | 8.154 | 1.221 | 377 | 329 | 50 |
| Rækjur | 106.375 | 90.235 | -10.234 | 7.959 | 6.346 | -1.051 |
| Sardin | 23 | - | 23 | 16 | - | 16 |
| Síl | 175.082 | 137.926 | 36.464 | 7.171 | 2.194 | 923 |
| Sild | 185.887 | 171.998 | 33.802 | 56.811 | 45.809 | 6.252 |
| Skrubba | 805 | 10 | 639 | 83 | 2 | 46 |
| Skøta | 1.751 | 2.362 | 227 | 164 | 177 | -1 |
| Slógv | 23.721 | 17.632 | -9.755 | 27.170 | 21.247 | -2.604 |
| Steinbítur | 3.536 | 3.904 | -3.516 | 210 | 228 | -202 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Stinglaksur | 18.363 | 17.404 | 2.814 | 995 | 878 | 167 |
| Svartkalvi | 52.087 | 54.178 | -15.923 | 2.663 | 1.910 | -791 |
| Svartkjaftur | 30.582 | 111.062 | -23.617 | 17.168 | 30.298 | -40.168 |
| **Toskur** | **402.764** | 525.405 | **-202.338** | 12.922 | 16.303 | -436 |
| Tunfiskur | 0 | - | 0 | - | - | |
| Tunga | 4.995 | 6.514 | -3.170 | 282 | 258 | -78 |
| **Upsi** | **573.166** | 550.045 | **78.754** | 32.660 | 26.478 | 4.679 |
| Tilsamans | 3.655.235 | 4.208.764 | 93.227 | 289.310 | 302.730 | -43.287 |